## Eingin samanlegging á Sandoynni

Á kommunustýrisfundinum mánadagin legði Fríði Nolsøe, úr minnilutanum fram uppskot um at sandingar skulu atkvøðu um vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging á kommunuvalinum 11. november. Uppskotið fekk einans tvær atkvøður og fall. Meirilutin metti, at skotbráið var ov stutt. Í stuttari viðmerking við heimasíðuna bkv.fo sigur Fríði, at tað hann ikki er samdur við hesum. - Tað vísir seg at tað altíð er góð valluttøka til eitt kommunuval á Sandi, sigur hann.



## Mugu spara á Sandi

Á bygdarráðsfundi hjá Sands Kommunu mánadagin varð uppskot til fíggjarætlan fyri 2009 á skránni. Hædd er tikin fyri skattaprosentum og inntøkum til eina ætlan fyri 2009, nú útlitini síggja ikki so bjørt út í landinum og nærum øllum heiminum, skrivar bkv.fo. Harumframt við barnafrádráttinum kr. 6.000,00. Ásannað verður, at búskaparligu útlitini fyri komandi árini ikki eru av teimum bestu, og tað verður annars ein rættiliga stór avbjóðing fyri eitt komandi kommunustýri. Uppskot til fíggjarætlan 2009 skal viðgerast á einum øðrum fundi til endalig støðutakan.

## VB/Sumba tekur innandurakapping uppaftur

**Í mong ár var innandurakappingin hjá VB stórfingin endi á kappingarárinum í fótbólti. Nú verður roynt at fáa lív í aftur hetta tiltak**

KAPPING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tað var stuttligt og veitslukent í mong ár, tá innandurakappingin hjá VB setti eitt virðiligt punktum fyri kappingarárið í fótbólti. Av ymsum orsøkum datt tiltakið niðurfyri, men roynt verður nú at blása lív í aftur, og ætlandi verður innandurakapping um hálvan november.

Feløgini frætta um hetta í næstum, frættist frá VB/Sumba, ið vónar, at undirtøkan verður eins góð, og hon plagdi at vera.

Leikarar komu vanliga fríggjakvøld til Vágs. Síðani var gisting og annað fingin í rættlag, og so var dansur á skránni. Leygardagurin gekk við fótbóltskapping og á kvøldi var stór veitsla, har bestu leikarar, málskjúttar og málmenn vórðu heiðraðir. Og so var dansur á skránni. Sunnudagin vóru finalurnar á skránni.

Miðlarnir fylgdu vanliga eisini væl við kappingini.

Fyrireikararnir ætla at skipa komandi innandurakapping eftir sama leisti, og vinnandi lið fær gávukort. Teir vóna eisini, at luttøkan verður góð, tí fótbóltur og samvera gingu í hægri eind, tá leikarar soleiðis hittust til leik og veitslu í nakrar dagar, og var serstakur dámur yvir hesum.

Endaligt dato er enn ikki ásett, men hetta frætta feløgini um í næstum, frættist frá VB/Sumba.

# Ragnar, Hallur og Rannvá á countrykonsert

**Leygardagin 18. oktober verður countrykonsert í Norðurlandahúsinum. Har fara tríggir av okkara fremstu countrysangaranum at syngja. Tey eru: Hallur Joensen úr Klaksvík, Ragnar í Vík, Haldórsvík og Rannvá Vesturklett úr Tórshavn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hall kenna vit frá fløguni "Pickin' Time in Nashville", sum í fyrsta umfari seldi uml. 4000 eintøk. Hetta er eitt framúr høgt tal í Føroyum í dag. Sangurin, "Give my love to Rose", er higartil komin upp á nummar 2 á evropiska countryhitlistanum, so Hallur er bara eitt stig frá ovasta toppinum.

Í Føroyum er mest spældi sangurin hjá Halli óivað "Kyss ein eigil hvønn morgun".




### Ragnar

Ragnar í Vík hevur givið tríggjar fløgur út. Tvær við countryløgum á enskum og seinasta fløga hansara, "Lagnulogin", er á føroyskum við orðum og løgum, sum Ragnar sjálvur hevur gjørt. Ragnar er heldur ikki ókendur á evropiska countryhitlistanum, og á konsertini verður tað sjálvandi mest countrysangir á enskum, ið Ragnar fer at syngja, men okkurt lag av nýggju fløguni verða eisini spælt.

### Rannvá

Mánamorgun, aftaná at countrydansur hevði verið í Ítróttarhøllini á Hálsi síðst í januar mánað, fingu vertirnir í morgunsendingini hjá Kringvarpi Føroya eitt sms við hesum spurningi: Hvør var handan kvinnan, ið sang so einastandandi væl í dansinum leygarkvøldið? Og svarið var, Rannvá Vesturklett.

Tá Rannvá var yngri, sang hon í gentukórinum hjá Paula í Sandagerði, og tey, sum plagdu at hyggja at jólaløtuni í SVF seinast í áttatiárunum, minnast hana saman við Arinu Bishof og Elis Poulsen sum jólamanni, syngja sangin " Koyr okkurt í mína hosu". Sangurin er á kasettubandinum "Í Jólahýri", sum kom út í 1987. Seinnu árini hevur Rannvá sungið til dans við vælumtókta country-bólkinum Twiligt, og hevur eisini sungið á einum av countrytúrunum hjá Norrönu.

### Góðir tónleikarar

Tónleikararnir á konsertini vera Ólavur Øster solo, Pauli Magnussen bass, Jónleif Jensen trummur, Daniel Nilesen fiól, Petur Hermansen steel og Joan Petur Hansen, betur kendur sum Peddi, mandolin. Hallur og Ragnar spæla sjálvir rútmu til teirra framførslur og Robert Magnussen spælir rútmu til framførsluna hjá Rannvá.

Nógvir føroyingar hava verið á konsert í Grand Ole Opry í Nashville. Við nevndu sangarum og tónleikarum ber til at uppliva rætt Nashville huglag í Norðurlandahúsinum.

Atgongumerkir á 275 kr fásat á Shellstøðini við Streymin, Statoilstøðini í Sørvági, í Kunningarstovunum í Runavík, Klaksvík og Tórshavn.

Í Norðurlandahúsinum og á www.nlh.fo Eisini kann lesast um tiltakið á heimasíðuni www.faroesound.com

# Gagnmeti veitir ráðgeving um betri vanar

**Elin D. Næs hevur stovnað fyritøkuna gangmeti, ið veitir ráðgeving innan kostvanar**

KOSTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Elin D. Næs í Hvalba hevur stovnað fyritøkuna Gagnmeti. Elin er útbúgvin kostráðgevi og ætlar sær eisini at hava virksemi í Havn.

Hon sigur, at nú í byrjanini fer hon at hava góð tilboð, og at hesi eru galdandi fram til jóla.

### Ráðgeving

Elin D. Næs sigur um arbeiðsgongdina, at vanliga seta viðskiftafólk seg í samband við kostráðgevan. Eitt spurnarblað verður so útfylt, har kostvanar verða umrøddir. Kostráðgevin arbeiðir so við hesum og kemur við ráðgeving um, hvussu betringar kunnu gerast. Eftir nakrar vikur hittast viðskiftafólk og kostráðgevi síðani aftur at vita, um broytingar í kostinum hava gjørt mun.

- Kostráðgeving er viðkomandi, um trupulleikar eru við t.d. blóðsukrinum, vantandi orku í gerandisdegnum, um ein vigar ov nógv ella ov lítið ella um trupulleikar eru við strongd, vantandi imunverju ella ovurviðkvæmi, sigur Elin D. Næs.

- Um kroppurin ikki fær tað, ið honum nýtist, so kann hann ikki útinna tað, ið hann skal. Hetta kann í ringasta føri elva til sjúku. Men eisini tey, ið bara hava ynski um at broyta kostvanar, kunnu fáa hjálp frá kostráðgeva, leggur stovnarin av Gagnmeti dent á.

Vanliga virkisøkið hjá einum kostráðgeva, ar at ráðgeva virkjum, barnagørðum, skúlum og skipað verður eisini fyri skeiðum og fyrilestrum.



*Elin D. Næs í Hvalba hevur stovnað fyritøkuna Gagnmeti. Elin er útbúgvin kostráðgevi og ætlar sær eisini at hava virksemi í Havn*